# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Sum er fáa vit ikki meira arbeiðsfólk í Føroyum. Tí kann tað gerast neyðugt at taka enn fleiri útlendsk arbeiðsfólk til landið í framtíðini*

*Niclas Joensen - Articon*

# Articon keypt Garnavirkið og Hotel Oyri

**Articon hevur júst keypt hotel Oyri og bygningin, har ið Garnavirkið var. Bygningarnir eru samanvoksnir, og møguleikarnir við teimum eru nógvir. Articon fer møguliga at nýta bygningarnar til at hýsa fleiri útlendskum arbeiðsfólkum. Sum er búgva tey útlendsku arbeiðsfólkini hjá Articon á Hotel Oyri**

KEYP OG SØLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*




*Articon hevur júst keypt bygningin, har ið Garnavirkið var. Á myndini sæst eisini Hotel Oyri, sum Articon keypti fyri einum mánaði síðani. Bygningarnir verða møguliga umbygdir, so at teir kunnu hýsa útlendskum arbeiðsfólkum*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Articon hevur júst keypt bygningin, har ið Garnavirkið á Oyri var. P/f Vónin átti bygningin, men virksemið er flutt úr bygninginum. Articon keypti fyri einum mánaði síðani Hotel Oyri.

Niclas Joensen er ein av eigarunum og nevndarlimunum hjá Articon. Dagliga starvast hann sum figgjarstjóri hjá fyritøkuni:

– Bygningarnir vóru mestsum samanvoksnir, og tí hildu vit tað vera upplagt at keypa hann. Vónin átti bygningin, men teir brúktu hann ikki til nakað. Vit keyptu fyri einum mánaði síðani Hotel Oyri. Har búgva tey umleið 10 útlendsku arbeiðsfólkini, sum vit hava heruppi nú, sigur Niclas

Niclas kann ikki siga fyri vist, hvat bygningurin hjá Garnavirkinum verður nýttur til:

– Tað kann væl vera, at vit fara at byggja hann um, so at vit eisini kunnu hýsa útlendskum arbeiðsfólkum har. Ein annar møguleiki er at nýta hann sum goymslu. Vit fara helst at selja onkran bygning skjótt, so møguliga verður Garnavirkið avloysarin fyri tann bygningin, sigur Niclas Joensen, sum tó ikki vil fara í smálutir um fyristandandi søluna.

**Hava tørv á meiri arbeiðsorku**

Skipasmiðjan fer at taka enn fleiri útlendsk arbeiðsfólk til landið. Hetta hevur aftur fingið gongd í kjakið um útlendsk arbeiðsfólk. Articon hevur nógv at gera, og teir hava eisini trupulleikar við at finna arbeiðsorkuna í Føroyum.

– Vit hava nú umleið 10 útlendsk arbeiðsfólk í Føroyum. Hetta eru serliga betongarbeiðarar. Føroyskir timburmenn tíma ikki so væl at gera betongarbeiði.

– Sum er fáa vit ikki meira arbeiðsfólk, og tað kann vera ein trupulleiki, um eftirspurningurin veksur. Tað er sera keðiligt, um vit ikki verða førir fyri at útføra ein uppgávu, tí at okkum manglar arbeiðsorku. Tí kann tað gerast neyðugt at taka enn fleiri útlendsk arbeiðsfólk til landið í framtíðini. Tað mugu vit gera, um fyritøkan skal halda fram við somu ferð, sigur Niclas Joensen at enda.

Stórt úrval av bátum
Vitja okkum í Vestmanna



STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo

# Besta hoyggingarveður

*Mynd: Súsanna Kass Kristiansen*



Sosialurin er runt um landið og sigur frá, hvussu føroyingar nýta summarið. Týsdagin var undirritaði á Skála, har ið veðrið var av tí allarfagrasta.

Sosialurin møtti einari familjun, sum hoyggjaði á Skála í góðveðrinum. Tað eru eftirkomarnir hjá Ingvardi Poulsen, sum eru komnir til Skála at hjálpa pápa/verpápa/abba at hoyggja.

– Hetta er deiliga hugnaligt. Tað er eitt gott høvið at samlast, sigur Ingvard.

Sum tað sæst á myndini, nýtir Ingvard eina hvísl at hoyggja við.

– Hann er av tí gamla slagnum. Vit royna at lokka hann at nýta ballir, men hann er tvørur, siga tey øll flennandi.

**- HeiniK**

Sosialurin
www.sosialurin.fo